Privatisering: Koyringin minkar meiri enn eina helvt

Tá ið busskoyringin hjá Bygdaleiðum fer á privatar hendur á nýggjárinum, verður tað ómøguligt at hava somu tænastu, sum nú er, uttan at tað fer at kosta nógv meir, siga keldur, sum hava innlit í málið. Hetta vísir Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni aftur.

– Sum er, koyra Bygdaleiðir 360-370 tímar um vikuna í Suðuroy. Tá ið koyringin er blivin privat, fara bussarnir at koyra 130-140 tímar. Sostatt fer tænastan at versna munandi, siga fólk, ið kenna til málið

PRIVATISERING
Áki Bertholdsen

Tað verður eitt stórt afturstig fyri Bygdaleiðir, tá ið busskoyringin fer á privatar hendur á nýggjárinum.

Tað ivast fólk, sum kenna til málið, ikki í.

Keldur, sum hava innlit í málið taka Suðuroynna fram sum dømi.

Í Suðuroy koyra bussarnir hjá Bygdaleiðum 360-370 tímar um vikuna sum er. Men tá ið tær verða privatiseraðar, fara tær bara at koyra einar 130-140 tímar um vikuna.

– Sostatt fer koyringin at minka meiri enn eina helvt.

Keldur okkara hava eisini roknað út, at sum er, kostar koyringin einar 230 krónur um tíman, men at hon fer at kosta góðar 800 krónur um tíman, tá ið hon er privatiserað.

– Í ár kostar øll koyringin hjá Bygdaleiðum 21 milliónir krónur og tá er skúlabarnaflutningur og annar serflutningur uppi í.

Men verða øll tey lægstu tilboðini uppá tað privatu koyringina løgd saman, fer Bygdaleiðir at kosta 26 milliónir næsta ár – og tá er tað allarmesta av skúlabarnaflutningi og øðrum serflutningi, ikki talt upp í.

Lægsta tilboðið uppá koyringina í Suðuroynni er góðar 4,9 milliónir og tá er ein stórur partur av skúlabarnaflutninginum ikki uppi í.

Í løtuni kostar busskoyringin í Suðuroynni umleið 4,8 milliónir, men tá er allur skúlabarnaflutningurin uppi í.

Víst verður á, at eftir ætlanini, verður koyringin skerd heilt fitt. Í løtuni koyra sjey bussar, men eftir nýggjár verða teir bara fýra.

– Tvs, at teir mugu byrja munandi fyrr at koyra um morgunin fyri at fáa stundir at koyra øll til Smyril og til arbeiðis og sostatt mugu fólk enn fyrr upp um morgunin – og tey flestu halda ivaleyst, at tað er nóg tíðliga sum er.

Stúrir fyri ruðulleika í koyring hjá Bygdaleiðum



Henrik Old ivast ikki í, at tað verður eitt stórt afturstig, tá ið koyringin hjá Bygdaleiðum fer á privatar hendur. Hann reisir nú málið í tinginum, tí hann vil hava fulla greiði á, hvussu verður við Bygdaleiðum

– Tá ið Bygdaleiðir verða privatiseraðar, fer hendan tænastan at kosta nógv meiri, enn hon ger nú og hartil fer tænastan at versna, heldur Henrik Old, løgtingsmaður, sum nú fer at reisa málið í tinginum

PRIVATISERING
Áki Bertholdsen

– Eg vil hava fulla greiði á, hvussu verður við Bygdaleiðum, eftir at busskoyringin fer á privatar hendur 1. januar.

Henrik Old, Løgtingsmaður, fer nú at reisa spurningin at privatisera Bygdaleiðir í Løgtinginum.

Hann sigur, at tær kanningar, hann hevur gjørt, vísa, at tá ið Bygdaleiðir verða privatiseraðar, fer tænastan at versna og hartil fer busskoyringin at verða væl dýrari, enn hon er í dag.

Tí fer hann nú at seta landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, nakrar skrivligar fyrispurningar um Bygdaleiðir.

Henrik Old sigur, at nú er so nógv útliðið og tí hevur tað stóran týdning at rudda øll ivamál avvegnum nú, áðrenn tann nýggja skipanin kemu í gildi á nýggjárinum.

– Í fyrispurningi sínum tekur Henrik Old Suðuroynna sum dømi.

– Sum eg skilji, hongur ein munandi partur av koyringini hjá Bygdaleiðum enn í leysari luft, hóast tað nú eru minni enn tveir mánaðir eftir, til koyringin fer á privatar hendur.

Henrik Old vil m.a. hava at vita frá landsstýrismanninum, hvussu túratalið verður eftir 1. januar, afturímóti í dag og hann vil hava greiði á, hvat tað fer at kosta og, hvussu verður við skúlabarnaflutningi, ferðaætlan o.s.fr.

Flutningur við skúlabørnum í vanda

Ikki minst vísir Henrik Old á, at tá ið Bygdaleiðir koma á privatar hendur fara bussarnir fyri ein stóran part ikki at koyra skúlabørn longur.

– Skúlabarnaflurningurin er rættiliga umfatandi sum er. Børn verða koyrd ímillum fleiri ferðir um dagin, alt eftir, nær tey skulu møta og nær tey fáa frí. Haraftur at er nógvur flutningur ímillum skúlar ymsar tíðir á degnum, børn verða koyrd úr einum skúla í annan til svimjing og ímillum ymsar skúlar til ymsar lærugreinar og børn verða koyrd ímillum skúla og ítróttarhallir til fimleik o.s.fr.

Løgtingsmaðurin sigur, at allur hesin flutningurin heldur uppat á nýggjárinum.

– Eftir nýggjár verða tað kommunurnar sjálvar, sum skulu gera avtalu um at koyra skúlabørn aftur og fram.

– Men talan er um rættiliga nógv børn, so tann, sum fær Bygdaleiðir at koyra, fær í veruleikanum einkarrætt uppá koyringina og kann sostatt áseta prísin sjálvur og tí er vandi fyri, at tað fer at dýrka munandi.

framhald á síðu 11

Bygdaleiðir fara ikki at versna

Eg dugi ikki at ímynda mær, at tænastan hjá Bygdaleiðum fer at versna, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni

PRIVATISERING
Áki Bertholdsen

– Eg kann ikki ímynda mær, at tænastan hjá Bygdaleiðum fer at versna, tá ið koyringin er komin á privatar hendur.

Tað sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni. Men hann sigur at tølini nú og tølini eftir 1. januar, kunnu als ikki samanberast, tí tey eru sett heilt øðrvísi upp.

– Tað er rætt at í fyrstu syftu kann tað tykjast sum at Bygdaleiðir verða dýrari, tá ið tær eru privatiseraðar, tí tá er tær mettar at kosta 26 milliónir, um øll tey lægstu tilboðini verða tald saman og nú kosta tær bara 21 milliónir.

– Men hetta er útfrá tí, at bussarnir verða avskrivaðir eftir fimm árum. Vit sita nú og rokna út, hvat tað fer at kosta, um bussarnir verða avskrivaðar eftir 10 árum, sum er rímiligt fyri ein nýggjan buss. Og tá verður kostnaðurin ein heilt annar, sigur fólkaflutningsleiðarin. Hvussu nógv bíligari tað so verður, veit hann ikki enn, tí roknistykkið er ikki liðugt.

Hann vísir eisini á, at kostnaðurin eftir 1. januar skal eisini síggjast í mun til, at tá er talan um nýggjar bussar, sum eisini eru betri at ferðast við og tá verður meiri at betala í rentum og avdráttum.

Poul Jákup Thomsen sigur eisini, at í fyrstu syftu kann tað tykjast sum um koyringin fer at minka munandi, tí á pappírinum stendur, at tímarnir eru færri.

Men hesi tølini eru als ikki sambærilig, tí frá 1. januar verður arbeitt við einum hugtakið, sum eitur effektivir tímar.

Tvs, at tímarnir verða bara taldir frá tí, at bussurin fer á rull, til hann steðgar aftur. Tíðin, tá ið bussførarin møtir í bussinum, áðrenn hann fer á rull, verður heldur ikki tald uppí og heldur ikki er tíðin fyri at vaska tald uppí og ei heldur tíðin, tá ið bussførarin koyrir til hús, eftir lidna koyring, ella tíðin til umvælingar o.s.fr.

Men í tímaprísinum, sum er givin upp fyri effektiva tí, er øll hendan "spilltíðin" roknað uppí.

Poul Jákup Thomsen viðgongur, at skúlabarnaflutningurin er ikki uppí, tí tað eru kommunurnar, sum hava ábyrgdina av honum.

– Tað einasta, sum er uppií, er flutningurin í skúla um morgunin og heimaftur seinnapartin. Men allur millumflutningurin, til og frá svimjing, fimleiki o.s.fr. er ikki uppi í.

– Mentamálastýrið hevur heitt á okkum um at rokna út, hvat tað fer at kosta at Bygdaleiðir átaka sær tann flutningin eisini og tað meta vit um nú. Rokningin fyri tann serflutningin verður so sendir Mentamálastýrinum.

Poul Jacob Thomsen sigur, at tá ið Bygdaleiðir verða privatiseraðar, verður koyringin nógv effektivari, tí hóast bussarnir verða færri, fara teir, sum eru, at koyra fleiri tímar og alt í alt fer tænastan ikki at versna.

Hinvegin heldur hann, at fleiri aðrir, stórir fyrimunir verða, eitt nú skal landið hereftir samráðast við ein arbeiðstakara í Suðuroy, nú eru teir sjey.

Ruðulleiki

Í løtuni koyra sjey bussar fyri Bygdaleiðir í Suðuroynni.

Henrik Old sigur, at tá ið Busskoyringin verður privat, er tað ætlanin at tað skulu vera fýra bussar, sum skulu røkja alla koyringina.

– Eg ivist stórliga í um tað yvirhøvur letur seg gera at røkja alla koyringina við fýra bussum. Hvussu skulu bussarnir koyra fólk úr allari oynni til Smyril á Drelnesi klokkan sjey um morgunin og kunna fara út aftur í hvønn krók í oynni at koyra fólk til arbeiðis og í skúla klokkan átta?, spyr hann.

Hann sigur, at hetta letur seg ikki gera, uttan at túrarnir um morgunin verða framskundaðir nokk so fitt og at bussarnir tí mugu koyra munandi fyrr um morgunin. sostatt mugu sumbingar og sandvíkingar, sum frammanundan skulu upp á hálvari nátt fyri at sleppa við Smyrli, nakað væl fyrr av songini.

Tí stúrur Henrik Old fyri ruðuleika, tá ið Bygdaleiðir verða privatiseraðar og í øllum førum ivast hann ikki í, at tænastan verður munandi verri.

Annars hevur Landsstýrið lovað, at talan skal ikki verða um eitt vet av afturstigi, tá ið bussarnir verða privatiseraðir.

Henrik Old vísir eisini á, at tað er eisini ógvuliga ivasamt, hvussu verður við ymsum øðrum serflutningi, eitt nú í samband við ítrótt.

– Um vikuskiftið er rættiliga stórur tørvur á flutningi í samband við ítrótt bæði tá ið ítróttarlið skulu av Smyrli og til ymsar bygdir í Suðuroy og tá ið tey skulu avstað aftur. Og eg ivist stórliga í, um Bygdaleiðir verða førar fyri at átaka sær koyringina, tá ið bussarnir verða so fáir.

Hann sigur, at í ár standa góðar 18 milliónir á fíggjarlógini til Bygdaleiðir, tá er skúlabarnaflurtningurin uppií

– Næsta ár ætlar Landsstýrið at seta góðar 22 milliónir av til Bygdaleiðir og tá er skúlabarnaflutningurin ikki uppi í.

– Hetta er ikki tekin um, at tað verður bíligari, tá ið busskoyringin verður privatiseraðar. Men afturat teimum 22 milliónunum, skulu so útreiðslurnar til skúlabarnaflutningin, so tilsamans verður tað nógv dýrari, tá ið Bygdaleiðir eru privatiseraðar, ufmramt at túrarnir verða færri og óhøgligari.

Kvinnurnar yvirtaka fólkaskúlan

– Eg eri ikki fyri, at vit tilvitað taka mannligu umsøkjararnar til Læraraskúlan framum konufólkini fyri at stýra gongdina á tann hátt, sigur Elsa Birgitta Petersen

Mannligu lærararnir fækkast í fólkaskúlanum og mannfólkini dragna afturúr, tá ið tað snýr seg um at sleppa inn á Læraraskúlan. Hinvegin halda teir seg ikki aftur, tá ið tað snýr seg um at seta seg í skúlastjórasessin

FÓLKASKÚLIN
Turið Kjølbro

Kvinnurnar eru av álvara við at yvirtaka føroyska fólkaskúlan. Í dag starva 708 lærarar í føroyska fólkaskúlanum, harav 375 eru konufólk ella meiri enn helmingurin. Fyri minni enn eini fjórðingsøld síðani var støðan tann øvugta. Tá var triðingurin av lærarum kring landið kvinnur.

Fyrr vóru lærarar annaðhvørt tænastumenn, ársvikarar ella tímalærarar. Í seinnu helvt av nítiárunum varð hetta broytt, og tey, sum í nógv ár høvdu verið ársvikarar og tímalærarar, gjørdust nú sáttmálasett. Í hagtølum frá Mentamálastýrinum síggja vit, at nógv teir flestu lærararnir, sum eru settir sum tænastumenn, eru mannfólk. Ikki færri enn 193 av 333. Samsvarandi eru bert 104 konufólk sett sum tænastumenn. Hinvegin er myndin tann øvugta, tá ið tað snýr seg um sáttmálasettar lærarar. Har eru 192 kvinnur og 76 mannfólk. Út frá hesum tølum síggja vit, at flestu tænastumenninir, sum í dag eru fólk uppi í árunum, er menn, meðan flestu sáttmálasettu eru yngri kvinnur.

Á flestu skúlum er kynsbýtið enn javnt, men á nøkrum skúlum eru kvinnurnar farnar væl fram um í tali. Hví kynsbýtið er broytt so munandi eftir lutfalsliga ikki so nógvum árum, eru nógvar metingar um. Lærarayrkið er í dag nógv øðrvísi enn fyrr. Uppgávan hjá læraranum er vorðin í líka stóran mun uppalingarlig og sosial sum bóklig. Og tað er kanska hesum menninir flýggja undan.

– Konufólk velja enn í rættiliga stóran mun útbúgvingar, sum hava við menniskju at gera. Í góðum tíðum velja menn útbúgvingar og arbeiði, sum eru betur lønt enn lærarastarvið. Í ringum tíðum, tá ið væl løntu størvini eru færri í tali, velja menn aftur fólkaskúlan, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

Hesum tekur rektarin á Føroya Læraraskúla, Pauli Nielsen, undir við.

– Áðrenn kreppuna sóu vit, at fleiri menn fóru úr fólkaskúlanum í væl lønt arbeiði, men tá ið kreppan kom, komu teir afturíaftur. At uppgávan hjá læraranum er broytt so nógv, er helst ein orsøk til, at teir flýggja. Hinvegin síggja vit, at mannligir lærarar sum eru avgjørt síggja lærarayrkið sum eina heildarkenda uppgávu, sigur Pauli Nielsen.

At fleiri kvinnur enn menn velja lærarayrkið sum sítt lívstarv, er ikki eitt serføroyskt fyribrigdi.

– Alla staðni síggja vit, at konufólk eru vit at taka seg inn á menninir, at tær velja góðar útbúgvingar og at tær í nógv størri mun enn fyrr sita í góðum og væl løntum størvum. Kvinnur taka útbúgvingina í størri álvara mangan enn menninir, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Óheppin gongd

Tað er ikki heppið fyri fólkaskúlan, um gongdin verður tann, at fá mannfólk velja at starvast í fólkaskúlanum í nøkur ár.

– Tað er eftir mínum tykki sera óheppið. Tað besta er ein góð javnvág millum kynini og at líka nógv ung sum eldri starvast í fólkaskúlanum. Tað gevur tað besta samspælið, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Ein vandi í hesi gongdini kundi verið, at ávísar lærugreinir detta burtur úr, tí menninir halda seg burtur, men soleiðis vísir tað seg tíbetur ikki.

– Lærugreinir, sum mannfólk mangan velja, eru framvegis væl umboðarar, eitt nú alisfrøði og støddfrøði, sigur Pauli Nielsen.

Gongdin kann vendast heldur forkvinnan í Føroya Lærarafelag, um vit leggja okkum eftir at tosa fyri lærarautbúgvingini soleiðis sum gjørt verður aðrastaðni.

– Lærarastarvið er eitt spennandi arbeiði. Hinvegin eri eg ikki fyri, at vit tilvitað taka mannligu umsøkjararnar til Læraraskúlan framum konufólkini fyri at stýra gongdina á tann hátt, sigur Elsa Birgitta Petersen.

– Nýggja fólkaskúlalógin hevur nógvar avbjóðingar til einstaka læraran, og hon er kanska orsøkin til, at talið á mannfólki, sum útbúgva seg til lærara, er vaksið eitt vet seinastu fáu árini, hóast teir rættiliga týðiliga velja aðrar útbúgvingar framum, sigur Pauli Nielsen.

Menn skúlastjórar

Valdsbýtið í føroyska fólkaskúlanum er kortini heilt øvugt galdandi kynsbýti. Á teimum størstu skúlunum kring landið eru 14 menn og 4 konufólk skúlastjórar. Ellivu menn eru varaskúlastjórar og 5 konufólk. Myndin er nøkulunda tann sama, hyggja vit at skúlaleiðarunum á teim minnu skúlunum.

– Tað líkist ongum, at tað er so. Fyrr vórðu menn tiknir fram um konufólk, tá ið skúlastjórastørv skuldu setast, uttan nakra grund. Hetta er tíbetur broytt og nú søkja fleiri kvinnur slík størv, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Samlað meting

Á Føroya Læraraskúla ganga í dag 100 næmingar í fýra árgangum, harav 28 eru mannfólk ella gott og væl fjórðingurin. Talið á mannligum lesandi er nakað hægri í dag enn fyri nøkrum árum síðani. Vanliga søkir eitt rættiliga stórt tal á fólki inn á Læraraskúlan á hvørjum ári.

– Vit hyggja ikki bert eftir prógvnum hjá umsøkjaranum. Lívsroyndir og arbeiðsroyndir av ymiskum slag telja eisini við. Tað vísir seg, at menninir dragna afturúr í samlaðu metinginni. Vit vita, at menninir fækka í tali í fólkaskúlanum, men kortini hava menn ikki fyrimun av teirri grund at sleppa inn á skúlan. Heldur ikki umhugsa vit at velja út á tann hátt, sigur Pauli Nielsen.

Sama gongd hevur gjørt seg galdandi millum undirvísararnar á Føroya Læraraskúla. Væl fleiri konufólk undirvísa í mun til fyri fáum árum síðani.

– Mannligu umsøkjararnir dragna afturúr í samlaðu metingini, sigur Pauli Nielsen, rektari á Føroya Læraraskúla